# Løgmaður vitjar vanlu

**Tað er ikki ókent, at statsleiðarar vitja vanlukkustøð, men í Føroyum er tað óhoyrt. Kortini var løgmaður, Jóannes Eidesgaard, í gjár og vitjaði í Skálavík fyri við egnum eygum at kunna seg um støðuna, eftir skaðaódnina seinasta hóskvøld**



Klæmint Myllhamar ruddar burtur úr bátinum hjá versoninum, sum er til sjós. Ein syrgilig sjón

SKAÐASKOÐAN
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kristian Vang*
*jensk@sosialurin.fo*

Tað vóru serliga tvær bygdir, sum vóru hart raktar av ódnini, sum var seinasta hóskvøld. Í Norðragøtu var tað nógvi vindurin, sum gjørdi um seg, og í Skálavík var tað nógva brimið, sum upp á tað nærmasta setti bygdina í undantaksstøðu.

Nógvu skaðarnir í Skálavík fingu í gjár løgmann at fara suður á Sandoynna at vitja hart raktu bygdina.

- Nei, tað var eingin áheitan komin um at fáa meg suður. Eg metti bara tað var rætt, at eg sum løgmaður vísti skálvíkingum ta virðing, sjálvur at koma suður at síggja, hvussu standurin var, segði løgmaður við Sosialin umborð á Teistanum á veg suður til Skálavíkar.

Komin suður, varð løgmaður stutt briefaður í »undirhúsinum« av borgarstjóranum, Linjohn Christiansen, og síðani var farið á ein eitt-tíma langan rundtúr, har borgarstjórin og Herman Petersen greiddu frá, hvat hent var, og hvussu ógvusligt brimið hevði verið.

Arbeiðið við at fáa bátarnar, sum soknir vóru, uppaftur var í fult sving, og menn frá Brimli við kavarum syrgdu fyri hesum arbeiði. Løgmaður gav sær góðar stundir at tosa við fólk, sum greiddi honum frá, at hetta brimið var óhoyrt í teirra tíð.

## Knústir bátar

Flestum er kunnugt, at einir fimtan bátar fingu skaða, fleiri teirra fóru í smæsta sor og gerast ikki aftur. Menn – og kvinnur – fingust við at bjarga tí, ið bjargast kundi av lutum, størri og smærri. Onkur hevði bjarga sær einum avhøvdara og einari trolnál, meðan onkur annar fekst við at lempa tara úr bátinum.

Tað var bæði ógvusligt og syrgiligt at síggja bátarovini, har tey lógu spjødd fram við havnarlagnum – tey, sum ikki longu vóru endað á bingjuplássunum. Og ringast av øllum, so eru ikki allir bátarnir tryggjaðir.

Tað var týðiligt, at løgmaður var ovfarin – fyri ikki at siga skelkaður – av, hvussu øgilig støðan var, og hvussu ótrúligar kreftirnar høvdu verið, sum skálvíkingar høvdu verið uppi ímóti seinasta hóskvøld.

Eftir at hava hugt seg gjølla um í sjálvum bátahylinum, gekk leiðin oman á Mølina, har Rúsdrekkasøla



Frystihúsið hjá útóðrarmonnunum í Skálavík fekk eisini sítt sjeyogtrýss



At hesin garðurin ikki helt, er einki at undrast í. Tað vóru sterkari lutir enn hetta, ið ikki stóðu ímóti sterku náttúrukreftunum